## IMF vil hjálpa Íslandi

Ísland hevur nú fingið eina tiltrongda peningainnspræning uppa á seks milliardir dollarar – á leið 33 milliardir danskar krónur. Hetta skal tryggja landinum eitt ávíst støðufesti. Sambært bretska blaðnum, Financial Times, hevur Altjóða Gjaldoyragrunnurin, IMF, tikið stig til eina umfatandi bjargingarætlan, nú bankakreppan er um at taka beinini undan brøðratjóðini fyri norðan. Eftir ætlan skal IMF sjálvt rinda eina milliard í stuðuli, meðan miðbankarnir í norðurlondum og í Japan seta seg fyri restina. Tað er framvegis ógreitt, um Russland luttekur í bjargingarætlanini. Samráðingar millum Ísland og Russland um at læna fýra milliardir dollarar endaðu úrslitaleysar í síðstu viku. Ísland hevur bráðfeingis tørv á valuta, og íslendski fíggjarmálaráðharrin var í sambandi við IMF í síðstu viku. Kortini hevur landið ikki formliga søkt IMF um stuðul enn. Ætlanin var at senda eina almenna umsókn í gjár. IMF setir Íslandi ávísar treytir, um grunnurin hjálpa landinum á føtir aftur. Eitt nú innlit í íslendska fíggjarheimin, umframt, at bankaskipanin verður endurskoðað, so hon lýkur altjóða normar. IMF vónar, at lív kemur í aftur íslendsku krónuni fyrsta dagin. Tær seks milliardir dollararnir svara til á leið 100.000 danskar krónur til hvønn íslending.



# Nólsoyarferjan flýtur enn

**Bjarni Djurholm, sum undir undanfarnu ABC-samgongu umsat Strandferðsluna, spyr nú Johan Dahl, vinnumálaráðharra, um arbeitt verður víðari við ætlanunum um nýggja nólsoyarferju**

FYRISPURNINGUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Bjarni Djurholm vil vita, hvar málið um nýggja nólsoyarferju flýtur*

Bjarni Djurholm tók aftur sæti á tingi, tá nýggj ABC-samgonga varð skipað fri stuttum. Hann umsat samferðslumál, tá málið um nýggja nólsoyarferju byrjaði. Seinni yvirtók Jacob Vestergaard málið.

Undir CHE-samgonguni hendi einki við nýggjari ferju til Nólsoyar, men nú nýggj ABC-samgonga hevur tikið við, spyr Bjarni Djurholm, hvat málið um nólsoyarferjuna flýtur.

Hann hevur sett soljóðandi fyrispurning fram:

Hvussu langt er komið við fyrireikingunum til projekteringina av nýggjari ferju til Nólsoyar?

2) Verður arbeitt við sama ferjuuppskoti, sum fyrra ABC-samgonga arbeiddi við?

3) Hvussu nógvir pengar verða settir av til projekteringina og bygging í 2009?

4) Veit landsstýrismaðurin um ætlan er at játta pening at dýpa innsiglingina til Nólsoyar havn, soleiðis sum skotið varð upp á heysti 2007?

Í viðmerkingunum sigur Bjarni Djurholm soleiðis:

»Undanfarna ABC-samgonga sjósetti fyrireikingarnar til nýggja nólsoyarferju. Á heysti 2007 var skitsuppskot liðugt og lagt fyri bygdarfólkið í Nólsoy til kunningar og viðmerkingar.

Táverandi landsstýri skjeyt í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2008 upp, at seta 4 milliónir krónur av til projektering av skipinum. Projekteringin skuldi vera liðug á heysti 2008 og byggingin byrja við ársenda í ár.

### 25 til 30 milliónir

Harumframt var løgtingið biðið um 1 mio kr at dýpa innsiglingina til Nólsoyar Havn, so at innsiglingin gjørdist betur egnað til størri ferju (er nú málsøki hjá Innlendismálaráðnum).

CHE-samgongan hevði ikki nólsoyarskipið ella dýpingina við í fíggjarlógini fyri 2008, hóast allar fyrireikingar frammanundan vóru greiddar, so at farast kundi undir projekteringina. Tískil er heilt fíggjarár nú farið fyri skeyti.

Nýggj nólsoyarferja kostar væntandi millum 25 og 30 mio kr og var ætlanin at játta peningin yvir tvey fíggjarár.

Ritan er skjótt 40 ára gomul, og hóast hon er sjógóð, so er hon púra ótíðarhóskandi til nútíðar ferðaog farmaflutning til bygd við útvið 300 fólkum.

Skal Nólsoyggin mennast og bygdafólkið annars støðast, so er fyrsta fortreytin, at nólsoyingar fáa nýggja ferju til flutning um fjørðin«.

### Enn óvist

Johan Dahl svaraði fyrispurninginum á tingfundinum í morgun. Til fyrsta spurning segði landsstýrismaðurin, at ferjan er liðugt teknað og prosjekterað og sum so klár at fara í útboð. Metti samlaði prísurin fyri ferjuna var í 2007 umleið45 milliónir krónur.

Felagið, sum prosjekteraði skipið, metir, at um ein líknandi ferja verður bygd til kallsoyarleiðina, kann prísurin fyri skip nummar tvey minkast við umleið 20%.

Til spurning tvey svaraði Johan Dahl, at talan var um sama skip, sum undanfarna ABC-samgonga arbeiddi við.

Til spurningin um, hvussu nógvur peningur er settur av til verkætlanina svaraði Johan Dahl, at einki var sett av í fíggjarlógini fyri 2009. Samstundis vísti landsstýrismaðurin á, at talan var um eina umsitingarliga framskriving av verandi fíggjarlóg, og at tað bleiv viðgerðin á løgtingi sum fór at avgera, um pengar verða avsettir til nýggja nólsoyarferju í 2009.

At enda segði vinnumálaráðharrin, at spurningurin um dýping av havnini ikki liggur undir hansara málsøki, men undir innlendismálaráðnum. Men eins og við ferjuni sjálvari verður tað spurningurin um politiska raðfesting sum ger av, um peningurin verður játtaður til hetta endamál á fíggjarlógini fyri 2009.

So alt í alt má sigast, at málið enn er rættiliga óvist.

# St. Ola ikki nøktandi

**Upp á fyrispurning frá Jaspuri Vang ásannar Johan Dahl, landsstýrismaður, at komforturin og umstøðurnar annars ikki eru nøktandi, men tað var einasti møguleikin hesaferð**

SUÐUROYARSIGLING
*leo@sosialurin.fo*

Nú St. Ola skal avloysa Smyril, meðan hann er í dokk at umvæla stabilisatorarnar, stúra nógvir suðuroyingar fyri farleiðini um Suðuroyarfjørð. Og tað hevur fingið Jaspur Vang at seta Johan Dahl, landsstýrismanni, fyrispurning hesum viðvíkjandi.

Spurningurin var:

Heldur landsstýrismaðurin, at ferjan St. Ola er hóskandi avloysaraskip at seta í sigling um Suðuroyarfjørð á vetrardegi, nú Smyril fer í dokk?

Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at tryggja Strandfaraskipum Landsins neyðugan fíggjarkarm soleiðis, at stovnurin frameftir fær:

• neyðugt skotbrá at leita eftir og finna hóskandi avloysaraskip, tá skipini hjá Strandfaraskipum Landsins eru til eftirlit og umvælingar? og

• umstøður at tilrættaleggja sítt virksemi soleiðis, at stovnurin kann bíleggja dokk í so góðari tíð, at eftirlit og umvælingar kunnu verða framd summarhálvuna?

Svarið frá Johan Dahl var soljóðandi:

»Eingin ivi er um, at komforturin og umstøðurnar annars ikki eru líka góðar á St. Ola sum á Smyrli, umframt at støddin á skipinum darvar farmaflutninginum.

Hinvegin er í hesum føri ikki talan um regluliga dokking, og tí er hon heldur ikki tikin við í ætlanunum hjá Strandfaraskipum Landsins á fíggjarlógini fyri 2008. SL hevur ásannað, at einki annað skip er at finna á marknaðinum í løtuni, og St. Ola lýkur øll trygdarkrøv sum eru sett til skip fyri at røkja siglingina um Suðuroyarfjørð.

Hóast dokkingin ikki er reglulig, er hon tó neyðug fyri at tryggja stabilisatorarnar og at fáa hesar eftirhugdar og settar í stand, áðrenn Smyril fer undir vetrarsigling.

2. Um alt gongur gongur eftir ætlan skal Smyril ikki í dokk aftur fyrr enn til heystar í 2010. Tí er góð tíð at royna at finna hóskandi avloysaraskip, og at taka hædd fyri hesum í fíggjarlógini fyri 2010.

Um valt verður at leiga størri avloysaraskip, má roknast við, at hetta verður dýrari fyri Strandferðsluna, og tí má hetta avspeglast í játtanini til stovnin í 2010.

Eg fari at miða eftir at finna eitt hóskandi avloysaraskip í góðari tíð næstu ferð Smyril skal í dokk, og vónandi fer hetta at merkja, at tað ber til at finna eitt avloysaraskip av hóskandi stødd, og har umstøðurnar annars eru í lagi. Tað skal annars havast í huga, at mesti farmur og flestu fólk ferðast í summarhálvuni«.